




**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3534
**Navn:** Sp/f Hamarsklettur
**Adressa:** 970 Sumba

**Kommuna:** Sumbiar Kommuna
**Stovningardato:** 24.03.2003
**Viðtøkudato**: 24.03.2003
**Kapitalur**: Kr. 90.300,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kr. 90.300,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnari**: Karl Rúni Lisberg, 970 Sumba.
**Stjórn:** Karl Rúni Lisberg, 970 Sumba.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift stjórans.
**Grannskoðari:** : P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 01.01.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka entreprenørvirki og aðra vinnu í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

*Skráseting Føroya tann 7. apríl 2003*
*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3533
**Navn:** Sp/f Timber Shipping
**Adressa:** Bryggjubakki 22, Box 106, 110 Tórshavn

**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 02.04.2003
**Viðtøkudato:** 02.04.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Sp/f 22.03.1986, Bryggjubakki 22, Box 106, 110 Tórshavn (Sp/f 2874)
**Stjórn:** Annfinn V. Hansen, 180 Kaldbak.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra.
**Grannskoðari:** : P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 02.04.2003 - 31.12.2003
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga og reka handilsskip, shipping og annað virksemi í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 7. apríl 2003*
*Kristin Balle*

# Kunngerð

## frá útskiftingarnevndini fyri Kunoyar bygd

Næsti útskiftingarfundur verður í bygdarhúsinum í Kunoy hósdagin 10. apríl kl. 10.30.

Kommunala ognartøkan og uppskot til garðahald verða framløgd.

Matrikulstovan, tann 31. mars 2003

N. v.
Øssur Á. Midjord,
útskiftingarnevndarformaður

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

**Tekniski Skúlin í Tórshavn søkir**

## lærara

**til maskindeildina**

Starvið er eitt fulltíðarstarv.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum maskinsmiðjur og minst 2 ára starvsroyndir innan yrkið.

Umsøkjarar við hægri útbúgving hava fyrimun. Eisini er áhugi fyri stødd-, alis- og evnafrøði, CAD/CAM, CNC og nýtslu av EDV, ein fyrimunur.

Á maskindeildini starvast 7 lærarar í føstum starvi, umframt tímalærarar og 1 verkstaðarhjálpari. Á deildini er tað dagliga næmingatalið umleið 60 sum eru: Lærlingar, SIT- og Atstøðisnæmingar.

**Setanarkor til fast starv**
Fyrstu 2 árini verða roknða sum royndartíð, har tann, sum verður settur í fast starv, má verða til reiðar at taka ta eftirútbúgving, tað verður seg pedagogiska/undirvísingarliga ella aðra førleikagevandi útbúgving, sum er neyðug fyri at verða settur í fast starv.

**Løn**
Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Starvið skal setast skjótast tilber og í seinasta lagi 1. mai 2003.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, viðmælum og starvstíð skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 24. apríl 2003.

Meira fæst at vita um starvið, við at venda sær til Helga Mortensen, leiðandi lærara á maskindeildini á tlf. 515872.

**TEKNISKI SKÚLIN Í TÓRSHAVN**
Marknagilsvegur 75 · Postsmoga 239
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 311957 · Telefaks +298 316621
tst@tst.fo · www.tst.fo

# Útbjóðing

Vegna Vestmanna kommunu verður arbeiðið við at gera nýggja útsykking uttanfyri Hóraná í Vestmanna, hervið boðið út í almenna lisiatión. Arbeiði umfatar í høvuðsheitinum:

- Vegagerð, uml. 700 m.
- Brúgv tvørtur um Hóraná.
- Vatnleiðingar.
- Kloakkleiðingar.
- El-leiðingar.

Útstykkingin umfatar 25 grundstykkir.

Arbeiðið er ætla at vera gjørt í tíðarskeiðnum mai 2003 - mars 2004.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggjast í seinasta lagi mánadagin 14. apríl 2003 við at flyta kr. 3.000 á konto nr. 151.845-2 í Føroya Sparikassa. Veðhaldið verður afturgoldið, tá útbjóðingartilfarið er aftursent óskatt í seinasta lagi eina viku eftir lisitatiónina.

**Pf. Sofus M. Jakobsen**
**Ráðgevandi verkfrøðingar F.R.I.**
J.H.Schrøtersgøta 22, 100 Tórshavn
Telefon 313522 - Telefax 310622
Teldupostur: PH@SMJ.FO

LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Brúgv til sølu

Við hesum verður fyribilsbrúgvin um Leynará í sambandi við gerð av Vágatunlinum lýst til sølu.

Brúgvin er ein stálbrúgv gjørd úr galvaniseraðum stálprofilum. Koyribreytin er 7,2 m og brúgvin spennir yvir 17,8 m.

Brúgvin, sum væntandi verður tikin niður í apríl 2003, kann til tá síggjast á staðnum í Leynum.

Tey bjóðandi skulu rokna við at avheinta brúnna norðuri við maskinmiðstøðina hjá Landsverkfrøðinginum í Kollafirði.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Óla M. Petersen, deildarleiðara, tlf. 311333, teldupost, oli@lv.fo

**Landsverkfrøðingurin**




